

*Ein rúgva av børnum við fløggum vóru komin at taka ímóti í Klaksvík, og har heppaðu tey á Mary. Tað fekk krúnprinsin at smílast*



*Á keiini í Klaksvík var tann reyði løbarin lagdur út, og býráðslimirnir tóku ímóti teimum kongligu*



*Kári Kallsberg, Árni Absalonsen, Mary og Fríðrikur hava verið ein túr niðri í bønum fyri at njóta útsýnið á Viðareiði*



*Mary heilsaði upp á børnini á Viðareiði*



*Margretha hevur fingið sær sess innast í Norðoyatunlinum Klaksvíkmegin. Tá ið drotningahjúnini vitjaðu*

# Drotningin fór und

**Í Klaksvík vitjaðu drotningin og prinsurin í undirsjóvartunlinum, meðan krúnprinsaparið fekk stórfingna móttøku á Viðareiði. Seinni mikudagin vitjaðu tey í Eysturoynni**

Mikumorgunin stevndi Dannebrog inn á vágna í Klaksvík, og har var lív í á keiini. Hópin av skúlabørnum við fløggum vóru at taka ímóti saman við teimum vaksnu, og børnini høvdu ilt við at bíða eftir Mary.

Tey róptu áhaldandi á Mary, og krúnprinsurin og prinsurin, sum stóðu á dekkinum, meðan skipið legði at, máttu smílast.

Løtu seinni gingu tey fýra í land, og eftir at borgarstjórin í Klaksvík hevði hildið røðu fyri



*Ja, tað sær næsta út sum, at okkurt er galið, tá ið tey vitja í Fuglafirði, men ivaleyst er myndin bara stuttliga tikin*



*Børnini í Fuglafirði høvdu pyntað seg við*